## Leitaðu eftir Lauru Dekker

Leygardagin boðaði niðurlendska løgreglan frá, at hon leitaði eftir teirri 14 ára gomlu Lauru Dekker, men í gjár komu boð um, at gentan var funnin á oynni Saint Martin, sum er í Karibiska Havinum. Laura Dekker gjørdist kend, tá hon ætlaði sær at sigla rundan um jørðina. Men ferðin varð av ongum, tí eftir áheitan frá myndugleikunum noktaði dómsvaldið henni at fara avstað, tí hon er so ung. Samstundis tók rætturin foreldramyndugleikan frá foreldrum hennara, og síðani hevur barnaverndin havt eftirlit við gentuni.



## Berlusconi meiri avhildin

Er tann seinasta meiningakanningin í Italia eftirfarandi, er Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, betur umtóktur í heimlandinum nú, enn hann var undan álopinum í Milano fyri átta døgum síðani. Í kanningini siga 55,9 prosent av teimum spurdu, at at tey styðja Berlusconi. Miðskeiðis í síðsta mánað søgdu 48,6 prosent tað sama. Kanningin stendur í blaðnum Corriere della Sera, og blaðið skrivar, at nógvir italiumenn hava havt samkenslu við tí 73 ára gamla Berlueconi eftir tilburðin í Milano.

# Smyril ikki í dokk fyrrenn næsta heyst

**Strandferðslan fer at mæla til, at Smyril ikki fer í dokk, fyrrenn summarsiglingin er av og sostatt fer hann ikki í dokk í aprí, sum tað annars varð stungið út í kortið**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Næsta ár skal Smyril takast úr sigling í hálvan annan mánað, tá ið hann skal í dokk at fáa eina endaliga loysn á teknisku trupulleikunum*

Tað verður ikki fyrrenn í september, at Strandfaraskipið, Smyril, sleppur í dokk at fáa endaliga bilukt við teimum teknisku trupulleikum, sum skipið hevur drigist við og sum nakrar ferðir hevur ført til, at tað hevur mist at kalla alla maskinorku í sigling ímillum Suðuroy og Havnina.

Tað staðfestir Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni.

Sostatt verður nú vent aftur til upprunaligu ætlanina, sum sigur, at Smyril skuldi í dokk í september.

Eitt skiftið lá enntá í kortunum, at dokkingin skuldi útsetast til í 2011 fyri at fáa fíggjarliga putlispælið at ganga upp í sambandi við fíggjarlógina fyri næsta ár.

Men eftir seinasta tilburðin, har Smyril misti maskinorkuna, varð málið aftur framskundað og tað eydnaðist at finna játtan, so at Smyril kundi sleppa í dokk næsta ár.

Og í hesum sambandi var eisini stungið út í kortið, at dokkingin skuldi framskundast til í apríl fyri at fáa eina endaliga loysn á trupulleikanum sum skjótast.

### Bíða til september

Conrad Gaard Joensen sigur, at tey á Strandferðsluni hava nú viðgjørt spurningin.

- Niðurstøðan er, at vit á Strandferðsluni fara at mæla til at bíða við dokkingini til í september, tá ið summarsiglingin er av, sigur hann.

Hann sigur, at orsøkin til tað er, at tann nýggja trygdarskipanin, sum skal setast í bátin og sum fær endaliga loysn á trupulleikanum, verður ikki liðug fyrrenn nakað út á árið.

Og ímeðan summarsiglingin er, heldur Strandferðslan ikki, at tað er rætt at fá skipið í dokk.

Annars eru tiltøk longu sett í verk fyri at vandin fyri at Smyril aftur missur maskinkraftina, er at kalla heilt útihýstur, men Smyril má í dokk áðrenn trupulleikin kann loysast einaferð með alla.

Rakstrarleiðarin sigur, at tað ber ikki til at fara at leita eftir hóskandi avloysaraskipið, fyrrenn tey vita akkurát, nær Smyril skal í dokk.

Tað er heldur ikki greitt, hvar hann fer í dokk. Men hann væntar, at tá ið tað verður, verður Smyril burtur í hálvan annan mánað.

# Bóndur skulu ikki betala fyri at fáa seyðin av vegnum

**Politikarar í Løgtinginum eru samdir um, at seyður á vegunum er ein trupulleiki, sum skal loysast, fer Løgtingið ikki at samtykkja at leggja órimiliga stórar byrðar á bøndurnar, sum teir orða seg**

Seyðurin skal burtur av vegnum.

Tað eru politikarar samdir í.

Men teir eru eisini samdir í, at tað skulu ikki órimiliga stórar byrðar leggjast á tey, sum eiga seyð og annan fenað.

Hinvegin hava teir okkurt annað boð upp á, hvussu málið skal loysast.

Fyri at røkka málinum heldur vinnunevndin, at rættast er at endurskoða og dagføra alla lóggávu um hegning og vertarfriðing.

Tað vakti miklan ans herfyri, tá ið nakrir løgtingslimir løgdu uppskot fyri Løgtingið um at fáa seyð og annan fenað av vegunum. Reyði tráðurin í uppskotinum var, at tað var tann, sum átti seyðin og fenaðin, sum skuldi bera allan kostnaðin av at stika og beina seyðin av vegnum.

Vinnunevndin hjá Løgtinginum tekur undir við endamálinum, men ikki við mátanum, tí tað leggur alt ov stóra ábyrgd og alt ov stórar skyldur á tey, sum eiga seyð og annan fenað, tí tað vera tey, sum fáa alla ábyrgdina

Sosatt óttast vinnunevndin fyri, at jarðarbúkarin kann fáa ovurhonds stór endurgjaldskrøv, skuldu óhapp hent í ferðsluni, har húsdýr eru uppi í.

### Aðrar loysnir

Katrin Dahl Jakobsen forkvinna í vinnunevndini sigur, at í Íslandi er tað Landsverk, sum hegnar fram við landsvegi, men so hava kommunurnar aktingarfólk, sum hava eftirlit við, at hegnið er tætt.

- Hetta er fyri at tryggja, at ikki onkur svíkur er ímillum, sum ikki røkir stikið, so at talan verður um eina falska trygd, sum ger støðuna upp aftur vandamiklari enn, um tað als ikki var hegnað.

Afturat hesum verður skeltað, har tað ikki verður hildið at vera neyðugt at hegna, men har eitt nú seyður er.

Forkvinnan í vinnunevndini heldur, at hetta er ein leistur, sum kundi verðið umhugsaður í Føroyum eisini.



*Politikarar ætla at arbeiða víðari við eini ætlan um at fáa seyðin av vegnum*